Biðjur um 20 milliónir beinanveg til sjúklingar

– Sjúklingar, sum hava fingið boð um, at teir ikki sleppa til Danmarkar til viðgerðar og kanningar, skulu ikki stúra, tí teir sleppa nú avstað kortini, sigur Bill Justinussen

SJÚKRAVIÐGERÐ
Áki Bertholdsen

– Øll, sum hava tað hava fyri neyðini at sleppa uttanlands til viðgerðar og kanningar, sleppa nú avstað kortini, tí landsstýrismaðurin hevur nú biðið figgjarnevndina um neyðuga peningin

Í farnu viku vóru tað mong, sum fingu ein skelk, tá ið Dagur og Vika fortaldi, at fleiri sjúklingar, sum eftir ætlan skuldi til Danmarkar til viðgerðar og kanningar, sluppu ikki av stað kortini, tí játtanin er brúkt upp.

Men bæði sjúklingar og avvarðandi kunnu nú draga andan lættari, tí nú sleppa tey avstað kortini.

Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum, hevur nevniliga gjørt av at biðja figgjarnevndina um eina játtan beinanvegin, so at sjúklingarnir sleppa avstað.

Tað varð Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður og limur í figgjarnevndini, sum elment á tingsins røðarapalli heitti á landsstýrismannin um at senda figgjarnevndini eina umsókn beinanvegin. Og løgtingsmaðurin legði afturat, at hann kundi veita vissu fyri, at umsóknin fór at vera avgreidd og jásttað uppá ein ella tveir dagar, tí tað fór ikki at vera nakar í figgjarnevndini, sum fór at seta seg upp ímóti hesum.

Og hesari áheitanini hevur Bill Justinussen nú gjørt av at fylgja.

Hann sigur, at hann helt, at tað var bara tá ið Løgtingið ikki var saman, at tað bar til at biðja figgjarnevndina beinleiðis um at játta pening við figgjarnevndarskjølum.

Brúka 20 milliónir meir

Í ár eru settar 60 milliónir krónur av til serviðgerð uttanlands, men longu nú eru brúkar 66 milliónir.

Framrokningar vísa, at hóast tattað verður í, fara útreiðslurnar upp á 80 milliónir í ár.

Tí heitti landsstýrismaðurin á læknarnar um at halda aftur í at senda sjúklingar uttanlands.

Men tað skilst á honum, at læknarnir hava onkusvegna hava misfatað boðini, tí eisini sjúklingar, sum hava tørv á regluligum kanningum í sambandi við ymsar sjúkur, hava fingið boð um, at teir ikki sleppa til kanningar tað, sum eftir er av árinum.

– Táið eg sendi læknunum hesa áheitanina, var tað ongantíð ætlanin at raka sjúklingar, sum á nakran hátt hava fyri neyðini at fara til Danmarkar og soleiðis var áheitanin á teir eisini orðað.

– Ætlanin var einans at lata teir sjúklingar bíða til næsta ár, har tað ongar avleiðingar fær, men eg má sjálvsagt lata tað upp í hendurnar á læknunum at gera av, hvør skal av landinum og hvør kann bíða.

– Tað harmar meg, tá ið sagt verður, at nú sleppa ikki fleiri sjúklingar av landinum í ár. Veruleikin er, at vit senda sjúklingar av landinum alla tíðina og har tað er neyðugt, verður tað eisini gjørt tað, sum eftir er av árinum.

Hann sigur, at ætlanin var síðani at søkja um 20 milliónir á eini eykajáttanarrlóg, fyri at tryggja, at teir sjúklingar, sum hava fyri neyðini at fara uttanlands tað, sum eftir er av árinum, eisini sleppa uttanlands.

– Men tað tekur tíð at avgreiða eina eykajáttanarlóg og nú málið fekk tað vend, sum tað fekk, havi eg gjørt av at fylgja tilmælinum, sum eg fekk fá Vilhelm Johannesen um at biðja figgjarnevndina um pening beinleiðis.

Tí hevur hann fyrireikað eitt figgjarnevndarskjal í vikuskiftunum, sum varð endaliga góðkent á landsstýrisfundi í gjáramorgunin og sum helst verð latið figgjarnevndini seinnapartin í gjár.

Bill Justinussen ivast ikki í, at peningurin verður játtaður beinanvegi, tí umframt teir sjúklingar, sum hava fyri neyðini at fara uttanlands, leggur hann afturat.

samgongu og úr andstøðu, umframt aðrir limir í samgonguni, sum hava heitt á hann um tað sama.

Hann fer sostatt at biðja figgjarnevndina játta 20 milliónir krónur beinanvegin, ístaðin fyri at lata tað bíða til eykajáttanarlógin einaferð kemur fyri.

Mugu framvegis tálma

Men samstundis leggur landsstýrismaðurin dent á, at hóast figgjarnevndin nú fer at játta 20 milliónir eyka, verður tað framvegis neyðugt at tátta í at senda sjúklingar úr Føroyum til viðgerðar og kanningar uttanlands.

– Tá ið vit siga, at játtanin fer at koma upp á 80 milliónir í ár, er tað við teirri treyt, at vit tátta í.

– Verður ikki táttað í, fer játtanin upp um 80 milliónir. Tí stendur áheitanin á læknarnar um at tátta í, framvegis við, sigur Bill Justinussen.

Men tað skal ikki raka

Mugu velja hvørjar viðgerðir sjúklingar skulu fáa uttanlands

Bill Justinussen fer nú at leggja uppskot fyri tingið um, hvørjar viðgerðir, tað skal bera til hjá føroyingum at fáa uttanlands. Vit noyðast at velja og vraka, sigur hann

SJÚKRAVIÐGERÐ UTTANLANDS
Áki Bertholdsen

Vit verða noydd til at eitt mark fyri, hvat vit sum samfelag skulu bjóða okkara borgarum av viðgerðum á útlendskum sjúkrahúsum, sigur Bill Justinussen

– Hvørjar viðgerðir skal at bera til hjá føroyskum sjúklingum at fáa uttanlands og hvørjar skal tað ikki bera til at fáa.

Hetta er ein álvarsligur spurningur, sum Løgtingið skal taka støðu til í næstum.

Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum, sigur, at hann arbeiðir við einum uppskoti, sum skal leggjast fyri tingið um, hvørjar tænastur vit skulu veita føroyingum á hesum øki í framtíðini.

Játtanin til serviðgerð uttanlands er økt ómetaliga nógv seinastu árini.

Í fjør vóru játtaðar 60 milliónir til serviðgerð uttanlands, men tað vórðu brúktar 72 milliónir. Í ár eru játtaðar 70 milliónir, men vit fara at brúka 80 milliónir.

Í uppskotinum til figgjarlóg fyri komandi ár, eru 70 milliónir settar av til serviðgerð uttanlands og eftir øllum at døma vita vit longu nú, at tað fer verri enn so at strekkja til.

Men Bill Justinussen sigur, at orøkin til, at 70 milliónir eru settar av, eru tí, at ætlanin er at taka ítøkilig stig til at forða fyri, at hendan játtanin skal veksa alt ov nógv.

Hann sigur, at tí fer hann at leggja uppskot fyri tingið um at lóggeva, hvørjar tænastur, vit skulu veita føroyingum á hesum øki, framyvir.

Sjúkur og vælferðartilboð

Hann sigur, at ein stórur partur av játtanini verður brúkt tilveruliga sjúkuviðgerð uttanlands.

– Men tað er eisini ein partur av játtanini, sum verður brúkt til endamál, sum ikki eru beinleiðis sjúkur. Eitt nú eru tað føroysk hjún, sum verða send uttanlands at fáa viðgerð fyri barnloysi.

– Hetta er ein tænasta, sum samfelagið betalir, eins og danska samfelagið betalir til at viðgerða donsk hjún fyri barnloysi.

Hinvegin betalir norska samfelagið ikki fyri eina slíka vælferðartænastu, hóast Noreg er eitt vælferðarsamfelag, tí norsk hjún, sum vilja hava serliga viðgerð fyri at fáa børn, mugu gjalda tað sjálvi.

Bill Justinussen sigur, at tað ber til at fáa eitt hav av viðgerðum uttanlands, bara goldið verður fyri tað. Talan er bæði um viðgerð fyri beinleiðis sjúkur, men tað eru talan um ymisk vælferðartilboð og útboðið av viðgerðum veksur í hvørjum.

Men samstundis veitir Bill Justinussen trygd fyri, at tey, sum hava tørv á viðgerð fyri sjúkur skulu altíð takast framum og hann sigur, at hann kann veita vissu fyri, at tann parturin av tænastum uttanlands verður ikki raktur.

– At viðgerða fyri sjúkur er fremsta uppgávan hjá heilsuverkinum og vit mugu ansa eftir, at sjúkuviðgerð ikki noyðist at víkja fyri ymsum vælferðartilboðum, sigur hann.

– Men sjálvandi kunnu vit koma í tað støðu, at tað onkustaðni finst ein ómetaliga dýr viðgerð fyri onkra ávísa sjúku. Hvussu víkir og vendir, og hvussu kensluleyst tað ljóðar, mugu vit í slíkum førum taka støðu til, um samfelagið skal betala fyri tað ella ikki.

– Hetta er ein ómetaliga eymur spurningur, sum krevur nógva viðgerð, men sum vit ikki sleppa undan.

Eitt annað dømi hann nevnir, er, at vit brúka stórar upphæddir uppá at bjarga børnum, sum eru fødd alt ov tíðliga samstundis sum vit ikki himprast við at taka fostur og tað heldur hann eisini er ein spurningur, vit eiga at viðgerða, saman við nógvum øðrum málum og ikki minst eru teir siðsemiligu spurningarnir stórur í hesum.

– Ein spurningur, vit mugu viðgerða, er, nær vit koma skapanarverkinum ov nær, heldur hann. Eitt nú kunnu vit koma í ta støðu, at tøknin batnar so at børn, sum verða fødd og tíðliga, og sum vit royna at bjarga, verða yngri og yngri og at tað bara styttist ímillum markið fyri, nær vit taka fostur og nær vit royna at bara ov tíðliga føddum børnum.

Jenis fingið hóttanir

Seinastu 14 dagarnar hevur løgtingsmaðurin, Jenis av Rana, fingið fleiri hóttanir. Leygarnáttina var hann aftur úti fyri eini minni stuttligari hending, tá postkassin uttan fyri heimið varð sprongdur í luftina

Leygarnáttina varð postkassin hjá Jenisi av Rana sprongdur í luftina. Pettini liggja spreidd um alt túnið
Mynd: Jens Kr. Vang

HÓTTANIR
Ingrid Bjarnastein

Jenis av Rana, løgtingsmaður fyri Miðflokkin, hevur seinastu 14 dagarnar móttikið fleiri hóttanir. Tær eru allar í sambandi við Televarpið og spurningin, hvørt tað fór at senda porno ella ikki.

– Eg havi javnan fingið fleiri hóttanir seinastu 14 dagarnar, sigur Jenis av Rana.

– Tær eru allar komnar við sms-boðum á fartelefonini, og tað er ógvuliga óbehagiligt. Eg veit ikki, hvussu álvarsamt hetta er, men eitt sindur er tað.

Leygarkvøldið varð postkassin uttanfyri heimið hjá løgtingsmanninum sprongdur í luftina.

– Tað vóru samfelagsmøtir uppi í høllini á Hálsi leygarkvøldið, og tí vóru vit seint uppi. Vit vóru á veg til songar, tá vit hoyrdu ein hvøllan brest og alt húsið ristist. Eg trúði, at ein partur av húsunum var farin í luftina, men tað var tíbetur bara postkassin, greiðir Jenis av Rana frá.

– Eg fór út beinanvegin, men eg sá ongan. Nú tá eg havi tosað við grannarnar siga teir, at bresturin var so harður, at teir mestsum allir eru vaknaðir av spreingingini.

Postkassin liggur nú slongdur út yvir eitt stórt øki, og kriminalpolitiið skuldi kanna málið nærri í gjár.

Fleiri hóttanir

Hóttanirnir ímóti løgtingsmanninum byrjaðu undir viðgerðini av skøkjulevnaðinum. Undir sjálvari viðgerðini fekk Jenis fleiri sms boð, har tað millum annað stóð, at um »pornokanalin« ikki fór at senda, so skuldi Jenis fáa hetta at merkja á annan hátt.

– Sjálvur veit eg ikki, hví eg fái slíkar hóttanir, tí eg havi onki havt við málið sum so at gera. Eg varð biðin at gera nakrar viðmerkingar til Sosialin tað eina kvøldið og dagin eftir ringdi útvarpið og spurdi um eg kundi koma oman at gera nakrar viðmerkingar til tíðindasendingina á middegi, sigur Jenis av Rana.

Hann heldur, at politikarar hava skyldu til at svara spurningum,ið verða settir, og var tað tí, at hann játtaði at gera viðmerkingar.

– Eg havi onga avgerðtikið í hasum málinum. Tað var fútin, sum tók avgerðina.

Undir viðgerðini av skøkjulevnaðinum fekk Jenis fleiri sms-boð, men hann strikaði tey beinanvegin, tí hetta vildi hann ikki hava inni á telefonini. Jenis sigur, at hann veit ikki, um sms-boðini og hendingin við postkassanum hava samband við hvørt annað.

– Um hetta var eitt annað tíðspunkt á døgninum, hevði eg helst ikki tikið tað so álvarsliga, men hetta var ímóti klokkan tvey um náttina, so tað kann ikki júst verða kallað fyri dreingjalótir.

Seinasta vikuskifti høvdu nakrir ungir menn eisini verið á hurðini heima hjá Jenisi. Sjálvur var hann ikki heima – hann var staddur í Suðuroy hetta vikuskifti, men konan var inni. Teir ungu mennirnir søgdu, at teir skuldu draga Jenis til svars fyri pornokanalina.

– Hetta við postkassanum er rættiliga óbehagiligt – serliga tí tað kemur sum ein liður í fleiri hóttanum.

Jenis sigur, at fyrsti skelkurin kom eftir at hava lisið eina grein í Fregnum. Greinin snúði seg millum annað um samreðuna, sum Miðflokkurin hevði við Boga Davidsen. Har stóð skrivað, at viðkomandi hevði helst kvalt Jenis við mikrofonleidninginum, um hann var journalistur.

– Tá eg las hatta, reageraði eg. Eg hugsaði, at um onkur ungdómur las hatta, og tók tað í álvara, og hvat so fór at henda. Síðani tá hevur tað so verið, at eg havi fingið fleiri og fleiri hóttanir, greiðir Jenis frá.

– Eg haldi, at hatta líkist ongum. Hatta er so óføroyskt, sum tað kann verða. Eg trúgvi ikki, at hetta er vanligt í Føroyum. Um onkur ikki skilir demokrati í Føroyum, so kann tað ikki verða rætt, at viðkomandi skal hótta politikarar fyri at fáa teir at tiga.

Ætlanin var annars, at Jenis skuldi niður til Danmarkar mánamorgunin til eitt eftirútbúgvingarskeið í sambandi við læknastarv sítt, men hetta helt hann ikki lata seg gera.

– Av hesi seinastu hendingini haldi eg ikki, at eg kann fara avstað. Men í handan postkassan kemur so ikki meira postur, sigur Jenis av Rana at enda.

Maður skotin í beinið

Um vikuskiftið hendi eitt óhapp í Hvalvík, sum kundi verið rættiliga álvarsamt. Ein maður, sum hevði verið og skotið harur, varð vegna ósketni skotin í annað beinið. Hann var so illa fyri, at hann varð fluttur niður á Ríkissjúkrahúsið í Danmark

ÓHAPP
Ingrid Bjarnastein

Um vikuskiftið høvdu menn verið og skotið harur í Hvalvík. Heimafturkomnir hendi eitt óhapp, sum var rættiliga álvarsamt.

– Vanliga verður avlætt áðrenn komið verður at húsum. Hesir menninir vóru komnir heim, og skuldu seta byrsurnar upp á pláss. Ein maður rættir so eina byrsu til ein annan mann, og byrsan gongur av. Annar maðurin verður skotin í lærið og partvís í hitt beinið, greiðir vakthavandi á politistøðini í Havn frá.

Maðurin, ið skotin varð, var rættiliga illa fyri. Av politistøðini verður upplýst, at tað var um reppið, at hann ikki bløddi út, tí skotið hevði rakt eina pulsæðr.

Um náttina varð maðurin fluttur niður á Ríkissjúkrahúsið. Á politistøðini í Havn vistu tey ikki meira um málið enn, at maðurin framvegis var á lívi.

Fleiri spreingingar

LØGREGLUTÍÐINDI
Ingrid Bjarnastein

Politiið í Havn sigur, at fleiri spreingingar hava verið seinastu tíðina í býnum. Teir vilja tí heita á fólk um at hava eygu og oyru opin og boða frá, um tey vita nakað um hesar spreingingarnar.

– Tað er ólógligt at brúka heimagjørt fýrverkarí ella knallfýrverkarí, so um nakar veit nakað at siga, skulu tey boða okkum frá, verður sagt av politistøðini.

Talan er um rættiliga sterkar løðingar, sum skaði kann standast av.

120 bilar kannaðir

FERÐSLUKANNING
Ingrid Bjarnastein

Í seinastu viku fór løgreglan undir eitt stórt ferðsluátak, har farið var undir at kanna bilar. Ljós, ferð, dekk og so framvegis verða kannað, og í Eysturoynni hevur løgreglan nú kannað 120 bilar.

10 rapportir eru skrivaðar um ymiskt, og var tað ein, sum varð tikin fyri at hava koyrt ov skjótt. Hann kann rokna við at missa koyrikortið, verður upplýst av politistøðini í Runavík.